VALGREINAR

Keyp og søla av fiski

Finnur Egholm
Valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy

Søla av daggomlum fiski má aldri fáa verri prís enn søla av eldri fiski. Til dømis skip, sum landa 8 til 15 dagar gamlan fisk, fáa sum regul betri prís enn tey, sum landa daggamlan fisk.

Her er nakað ravruskandi galið. Tað sær út til, at teir keypa gamlan fisk dýran fyri at keypa daggamlan fisk bíliga. Hasin gamli fiskurin verður ofta keyptur privat. Reiðari og flakavirkisstjóri tosa saman um, hvussu nógv fiskurin skal kosta pr. kilo, og fær reiðarin ikki tann prísin, hann vil hava fyri fiskin, umhugsar hann beinanvegin at landa uttanlanda, um hetta letur seg gera.

Tí var tað kanska ikki av leið at latið skipini sloppið at landa uttanlanda, um tað skal til fyri at halda prísin uppi her í Føroyum.

Sjómenn mugu fáa so nógv fyri fiskin, sum tilber, tí sjólívið er eitt hart arbeiði.

Í londunum rundan um okkum fáa sjómenn betri sømdir, enn tey á landi. Hetta skulu vit halda fast við, vit sum eru sjómenn. Fiskimannafelagið má eisini ansa væl eftir hesum.

Verður nakað gjørt við skattalættan hjá okkum, fara vit í verkfall beinanvegin. Tað eru nógv fólk í Føroyum, sum hava sjómenn í familjuni, so eg rokni ikki við, at tað verður misunt teimum. Tí biði eg tykkum velja ein flokk, sum ikki mótarbeiðir okkum. Veljið Sjálvstýrisflokkin.

Vit eiga at merkja fiskin

Á flakavirkinum átti at verið merkt fyri hvønn veiðuháttin sær, fyri at fáa so rættvísan pris sum til ber.

Fiskur, sum verður veiddur við snellu, línu, troli ella gørnum eigu ikki at verða blandaður saman, tá hann kemur á virkið. Heldur ikki gamal og nýggjur fiskur, tí snellufiskurin er nógv tann besti fiskurin, verður rætt borið at.

Daggamal snellufiskur átti at verið merktur fyri seg til at selja. Til dømis við einari Vágasnellu á pakkanum. Daggamal línufiskur átti at verið merktur fyri seg til at selja. Til dømis eitt bílæt av einari línu á pakkanum. Daggamal trolfiskur átti at verið merktur fyri seg til at selja. Til dømis bílæt av einum troli á pakkanum. Og somuleðis við hinum fiskasløgunum, t.d. frystur fiskur, garnafiskur o.s.fr..

Vágafólk

Tit vágafólk skylda Sjálvstýrisflokkinum við Sámal Petur í Grund á odda eina tøkk fyri, at undisjóartunnil verður gjørdur. Tí heiti eg á tykkum um at velja Sjálvstýrisflokkin sum eina tøkk.

Sjálvstýrisflokkurin fer eisini at arbeiða fyri tey brekaðu, bæði tey, ið hava sálarlig og likamslig brek. Og fyri tey gomlu, so tey kunnu fáa so góð kor sum til ber, at tey kunnu liva eitt lív á besta hátt her á landi ella uttanlanda.

Eg skilji ikki, at sambandsmenn siga, at vit eiga Føroyar. Er tað so, so mugu tit vísa okkum skeyti uppá hetta. Eg haldi ikki, vit skulu halda uppá Danmark meira. Danmark er fyrsta land í verðini, sum vígir samkynt. Hetta er ímóti Bíbliuni. Tá misti eg alt fyri Danmark. Hetta mugu sambandsveljarar duga at skilja, og tí velja Sjálvstýrisflokkin.

Sjálvstýrisflokkurin byggir á kristna siðalæru og verjir trúarfrælsi, politiskt frælsi, mentunnar- og vinnufrælsi og er ímóti mannamuni og allari happing.

Á hesum grundarlagi hevur Sjálvstýrisflokkurin sett sær fyri at tryggja lívsgrundarlag og sjálvssøgd rættindi hins einstaka borgara. At fremja ein rættvísan sosialan politikk eftir føroyskum fortreytum og at menna føroyskan siðaarv, mál og mentan.

Mytan um Ríkisfelagsskapin

Hanna Jensen
valevni Fólkafloksins í Eysturoy

Andstøðuflokkarnir rópa øgiligt um at varðveita ríkisfelagsskapin. Og út til føroyingar tosa skiftandi danskir statsministarar, um hvussu nógv teir virða hendan felagsskap. Men hin beiski veruleikin er ein annar.

Alf Ross, professari í statsrætti, skrivar 16. juni í 1947 í útkastinum til tulkingina av § 1 í Heimastýrislógini: »Når Færøerne er en del af Danmark, må der tales om rigsenheden, ikke rigsfællesskabet. Der består fællesskab mellem de ligestillede dele, men enhed mellem delen og helheden.« Slíkar viðmerkingar verða skrivaðar til tulking av lógum, sum verða gjørdar.

Hetta verður kallað imperialistiska tulkingin, og síðani 1992 er tað aftur og aftur staðfest at danska stjórnin, heldur seg fult og heilt til hesa tulking. Føroyingar hava kent tað á egnum kroppi, og tað hevur víst seg, hvørja ferð Landsstýrið hevur roynt at samráðast um fullveldistilgongdina. Afturvendandi orðini hava verið: »Danmark er en enhedsstat«

Serliga greitt kom hugsan donsku myndugleikanna fram, í svari Frank Jensens, løgmálaráðharra til Peter Skaarup hin 14. mars 2001:

»Med hensyn til muligheden for at overdrage ejendomsretten til den færøske undergrund kan jeg henvise til, at dette spørgsmål er behandlet i Justitsministeriets notat af 28. feb. i år om forholdet mellem grundloven og aftalen om Færøernes landsstyre om råstoffer i undergrunden. (...). Det fremgår bl.a. af notatet, at det har været tilkendegivet som en almindelig opfattelse, at grundloven ville være til hinder for, at den danske regering indgik aftale med hjemmestyret om overdragelse af ejendomsretten over råstoffer i undergrunden til befolkningen i en bestemt del af riget. Det fremgår videre af notatet, at det færøske hjemmestyre med råstofaftalen alene har fået overdraget den lovgivende og administrerende kompetence.«

Danir halda fast uppá, at teir hava yvirvaldsrættin, fullveldi í Føroyum, og tí siga teir seg eisini hava ognarrætin til undirgrundina og alt, sum í henni finst. Vit sleppa bert at løggeva á økinum og at umsita tað, men hava sambært teimum ikki yvirvalds- og ognarrættin.

So ríkisfelagsskapur er tað ikki. Felagsskap tosar man um, tá partarnir eru á jøvnum føti, tvs. at hvørgin er yvir hinum. Sum sæst í omanfyri nevndu viðmerkingum, so tosa danir um ríkiseind og ikki ríkisfelagsskap, og tað er sera greitt, sambært teimum, hvør er yvir hvørjum.

Gevist tí at tosa um hendan ríkisfelagsskap, sum bert finst í hugaheimi sambandsflokkanna!

www.hannajensen.subnet.dk

Trygg búskapargongd?

Reimund Langgaard
valevni Sambandsfloksins í Eysturoy

Yvirskotið fer frá 697 niður í 45 mió. kr. í bestu tíð. Skuldi Landskassin ikki verða við til at stabilisera búskapargongdina? Tað eru helst fleiri við mær, sum undrast á fíggjarliga politikkin hjá sitandi samgongu.

Búskaparfrøðingar, ið hava tikið undir við førda politikkinum, eru alt hetta valskeiðið endurgivnir fyri at siga, at tað er skilagott at leggja til síðis í góðum tíðum, so vit eru før fyri at standa ímóti, um vit skuldu uppliva eitt afturstig. Landskassin kann á henda hátt partvís útjavna tey sveiggj, ið altíð eru, og serliga í einum so viðbreknum búskapi, sum tí føroyska.

Vit hoyrdu týsdagin, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevði kunnað um úrslitið hjá landskassanum í 2001. Úrslitið var heilar 697 mió. kr.. Smb. fjølmiðlunum hevði landsstýrismaðurin tó brúkt minst líka nógva orku uppá at afturvísa, at landskassin í 2002 fær eitt munandi hall.

Upprunaliga yvirskotið uppá 121 mió. kr. á fíggjarlógini fyri 2002 er nú komið niður á einans 45 mió. Tá so 144 mió. kr. eru goldnar í avdrátti, eru uml. 100 mió. kr. minni í landskassanum enn við ársbyrjan.

Landsstýrismaðurin vísti á, at skattainntøkurnar eru størri enn metingarnar í fíggjarlógini, og tí fór úrslitið helst at gerast nógv betri enn tær 45 mió. kr. Landsstýrismaðurin gloymir sjálvandi, at eykajáttanirnar, sum vórðu samtykta seinastu dagarnar tingið var saman, helst ikki verða tær seinastu í hesum árinum - einki er tó galið í tí, at nýta tey argument, sum tala eins egnu søk.

Eftir sita vit vanligu borgarar við einum ringum smakki í munninum. Um Landskassin ikki megnar at leggja pening tilsíðis í bestu tíðum, gongur ikki long tíð áðrenn tað almenna fer at siga fólki upp, um vit fáa eitt búskaparligt afturstig.

2. partur – Havnin og politiska nalvaskoðanin!

Hans Birgir Hansen
Mr. Big

Skal Havnin sleppa undan politiska nalvaskoðan, skulu vit fáa skil á teimum ruðuleikum, ið valda á øllum økjum í Havnini/Suðurstreymoy, ið avbygdar/býarfólki skapar.

Tað vildi loyst allar trupulleikar í Havnini/Suðurstreymoy, um vit fingu eitt greiðari býti millum tað almenna/landi/kommunurnar /privata við at skipa miðspjaðingar ætlanir.

Vit skulu skipa høvuðsmiðfyrisitingar í Havnini/Suðurstreymoy og skipa partar av hesum undir einari lon úti á størri útjaðaroyggjum, ið er bygdar/økismenning. Vit skulu fremja slíkt innan fyrisiting, framleiðsluvirksemi, handil- og vinnulív, flutnings- og tænastuvinnu, skúlar, lærustovnar, ansing av børnum og teimum eldru.

Vit skluu hava útbúgvna/útlærda fólki at flyta út aftur til størri útjaðaraoyggjarnar, ið er bygdar/økismenning, og geva øðrum bygdarfólki útbúgving/læruupláss.

Eg dugi ikki at síggja, hvat vit skulu hava lands-/kommunalpolitikarar uttan fyri Havnina sitandi uppi á løgtingi, ið ikki fáa skapt bygdar/økismenning.
Tað kann sparast fleiri mió. kr. hvørt ár innan samferðslukervi við atliti til ferðamanna, farma, fiskaflutning morgun, seinnapart, kvøld hvørja viku.

Tað kann ikki vera rættvíst at lands-/kommunalpolitikarar hava dupult húsarhald og borgarlig størv í Havnini og úti í heimstaðar kommunum.

Tað er ikki rættvíst av arbeiðsgevarum/arbeiðstakarum í Tórshavnar kommunu at fáa sær arbeiðsmegi uttan fyri Havnina og uttanlands.

Tað er tá tøk arbeiðsmegi er í Tórshavnar kommunu, ið ikki fær nakað arbeiðstilboð tá avbygdar/býarfólki fær framíhjárættindir í Havnini.

Havnin/Suðurstreymoy skal ikki vera barnagenta hjá heimstaðar kommunum ein finst at.

HUGSKOTSKAPPING · HUGSKOTSKAPPING · HUGSKOTSKAPPING · HUGSKOTSKAPPING · HUGSKOTSKAPPING · HUGSKOTSKAPPING



EGG ella UNGI ... ?

Kapping um góð KT-hugskot

Í sambandi við KT2002 bjóðar KT-klekingardepilin við hesum til kapping um góð KT-hugskot. Kappingin er fyri teg, sum hevur góð KT-hugskot, men ivast í hvussu hesi kunnu gerast veruleiki.

Kom á KT2002 ókeypis
Ynskir tú vegleiðing í sambandi við títt KT-hugskot, kanst tú avtala fund við depilssamskiparan, Símun Hammer, á bási nr. 03 á KT2002. Um tú avtalar fund áðrenn hósdagin 18. apríl, fært tú ókeypis atgongd til fyrra dagin, fríggjadagin 19. apríl, sum er ein "business to business" dagur.

Vinnararnir
Tey bestu KT-hugskotini fáa innivist við løn í KT-klekingardeplinum í 3 mánaðir. Í hesum tíðarskeiði kanst tú menna KT-hugskot. KT-klekingardepilin hjálpir tær við at finna fígging, soleiðis at tú møguliga kann halda fram í deplinum í upp til 2 ár til víðari menning av hugskotinum.
Í sambandi við meting av innkomnum hugskotum, verður dentur lagdur á eina heildarmeting av verkætlanini, eitt nú um tað ber til at fremja verkætlanina í ásetta tíðarskeiðinum.

Umsóknarfreist
Umsóknir skulu sendast til: **KT-klekingardepilin, Bryggjubakki 12, 100 Tórshavn**, og verða deplinum í hendi í seinasta lagi 3. maj 2002. Úrslitið av kappingini um góð KT-hugskot verður kunngjørt fyrst í juni 2002.

Ein hugskotslýsing skal leggjast við umsóknini. Umsóknarblað finnur tú á www.kleking.fo, við at venda tær til depilssamskipar-an á tlf. 449591, ella á teldupostadressu: konsult@konsult.fo.

Endamálið við klekingardeplinum er at skapa serligar karmar fyri menning av nýggjum KT-fyritøkum við at geva teimum virkisligar karmar og lætta teimum um atgongdina til fígging og ráðgeving í byrjunartíðini tvs. í fyrstu stigunum í verkætlanartilgongdini við tí máli at handilsgera teirra tøkniligu menningarhugskot

KT KLEKING
www.kleking.fo konsult@konsult.fo



Góðu føroyingar!

[illegible]

Setið kross við lista

Við Sjálvstýriskvøðu
Eyðun Elttør
formaður

Musikkstevnan 2002

Dýri Biðidagur 26. apríl

Kl. 15.00 Stuttar útikonsertir á hesum støðum í býnum:
Við Háskúlan, við krossin Dalavegur/ Pedda við Steinsgøta og á Láarvegnum

Kl. 15.30 Skrúðgongur frá konsertstøðunum móti miðbýnum

Kl. 16.00 Konsert á Tinghúsvøllinum. Jan Christiansen borgarstjóri setur stevnuna

Kl. 19.30 Almenn kvøldseta í Norðurlandahúsinum. Umframt horn- og harmoniorkestrini, sum fara at framføra ymiskt til gaman og álvara, luttaka eisini Havnar Ungdómshornorkestur, Næmingaharmoniorkestrið hjá Musikkskúlanum og Ælabogin.

Leygardagur 27. apríl

Kl. 15.00 Galla konsert í Norðurlandahúsinum.

Luttakarar verða:
Nes Sóknar Musikkfelag
Sørvágs Tónleikarafelag/ Vestmanna Hornorkestur
Fuglafjarðar Hornorkestur
Harmoniorkestrið GHM
Havnar Hornorkestur
Tvøroyrar Hornorkestur
Klaksvíkar Hornorkestur
og stórt felagsorkestur við luttakarum úr øllum orkestrunum.

Atgongumerkir til konsertirnar í Norðurlandahúsinum, á 60 kr. fyri vaksin og 20 kr. fyri børn, eru at fáa í húsinum.

Vælkomin til Musikkstevnuna 2002

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Pedagogur

Vegna barnsburðarfarloyvi søkja vit eftir avloysara til vøggustovu við 11 børnum. Talan er um 35 tíma pedagogstarv.

Starvið verður sett 15. juni 2002 ella eftir nærri avtalu.

Stovnurin er skipaður við eini vøggustovu við 11 børnum og tveimum barnagarðsstovum við ávikavist 22 og 17 børnum.

Vit bjóða
Eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum.

Dentur verður lagdur á, at tær dámar at vera uttandura í øllum veðri. Tú megnar at skapa ein tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Setanarviðurskifti
Tann, ið settur verður, skal starvast saman við einum pedagogi og tveimum hjálparfólkum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Tórshavnar kommunu og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í avmarkaða tíð.

Meiri fæst at vita
við at venda sær til Óla Midjord, leiðara tlf. 310905, ella Katrin Petersen, samskipara tlf. 315160.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til Býlingshúsið Norðasta Horn, Granagøta 5, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 15. Mai 2002.

SNARSKIVAN

SLANGUVOGNAR
við t.d. 60 m 1" slangu

· Brandslangur
· Eldsløkkjarar
· Brandteppir

Væl hóskandi til havnir, virkir, stovnar, skúlar og aðrar bygningar.

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

www.sosialurin.fo